

Fyrsti kvinnuligi forsetin í Finnlandi, Tarja Halonen, heilsar her upp á Paavo Lipponen, fyrrverandi forsætisráðharra

## Forsetar í Finnlandi

| | |
|---|---|
| K.J. Ståhlberg | 1919-1925 |
| L. Kr. Relander | 1925-1931 |
| P.E. Svinhufvud | 1931-1937 |
| Kyösti Kallio | 1937-1940 |
| Risto Ryti | 1940-1944 |
| C.G.E. Mannerheim | 1944-1946 |
| J.K. Paasikivi | 1946-1956 |
| Urho Kekkonen | 1956-1982 |
| Mauno Koivisto | 1982-1994 |
| Martti Ahtisaari | 1994-2000 |
| Tarja Halonen | 2000- |

## Finnland

**Øki:** 338.145 ferkilometrar
**Íbúgvaratal:** 5,2 miljónir
**Statsformur:** Lýðveldi
**Almenn mál:** Finskt og svenskt
**Átrúnaður:** Protestantar og ortodoksir
**Høvuðstaður:** Helsinki
**Størsta vatnið:** Stóra Saimaa, 4.400 ferkilometrar
**Størsta áin:** Kemi-áin, 552 km
**Kendar fyritøkur:** Nokia, Fazer, Fiskars, Kone og Wärtsilä

Finnland 90 ár:

# Frá skógarbrúki til Nokia



*Skógarbrúk hevur í stóran mun verið grundarlagið undir finska búskapinum, sum tó hevur ment seg nógv seinnu árini*

**Finnland er óivað millum tey lond, sum hevur havt størst framburð síðstu árini**

TJÓÐSKAPARSØGA
*Heri Simonsen*
*heris@sosialurin.fo*

Veturin er langur í Finnlandi, og hevur tað gjøgnum tíðinnar verið torført hjá finnum at útvega sær eitt livibreyð. Strongu náttúruviðurskiftini, ein stórur tørvur á orkukeldum, stóru frástøðurnar, og tunna íbúgvaratalið í mun til støddina av landinum, hava gjørt liviumstøðurnar torførar hjá finnum. Nógv tann størsta inntøkukeldan hevur gjøgnum søguna verið skógarbrúki. Her fáa finnar til vega skipstimbur, og aðrar sagverksvørur. Í dag er Finnland eitt av heimsins førandi londum, tá tað kemur til at flyta út pappír og kartong. Skógarídnaðurin er í dag umleið ein triðingur av útflutningi Finnlands.



*Ein av uppfinningunum, sum stórur partur av heiminum man takka finnlendingum fyri, eru ísbrótararnir*

### Metalídnaður og samskifti

Metalídnaðurin eigur 40% av finska útflutninginum. Finnland er heimskent fyri framleiðsluna av ísbrótarum, tangaskipum, og stuttleikaskipum í fremsta marglætis-flokkinum. Seinnu árini er metalídnaðurin blivin meiri fjølbroyttur. Kenda fyritøkan Kone er tiltikin fyri sínar elevatorar, og aðrar hydrauliskar framleiðslur.

Tað er tó innan samskiftistøknina, at Finnland hevur sligið sítt navn fast í heimssamfelagnum síðstu árini. Og sigur tú: Finnland, so mást tú eisini siga: Nokia. Í árinum 2000 seldi Nokia – haldið tykkum føst – 128 miljónir telefonir! Haraftrat er fyritøkan millum heimsins fremstu tá tað kemur til telesamskiftis-netverk og fjølmiðla-terminalar. Framleiðslurnar hjá Nokia verða seldar í næstan øllum heimsins londum.

### Væl útbúnir

Útbúgvingarstøðið í Finnlandi er óvanliga høgt. 13% av fólkinum hevur prógv frá lærdum háskúla, ella aðra høga útbúgving. Rættuliga stórur partur av fólkinum hevur eisini eina miðalhøga útbúgving. Skúlin verður raðfestur høgt í Finnlandi. Tað vísti úrslitið av PISA-kanningini eisini, har Finnland gjørdist nr. 1. Tað eru gott og væl eingir analfabetar í Finnlandi. Fólkaskúlin verður nevndir Grundskúlin. Tey fyrstu 6 árini leggja grundina við grundfakunum at lesa, skriva, rokna. Men longu tíðliga læra næmingarnir enskt. Sjeynda, áttanda og níggjunda árið eru tann sonevndi Yvirbygningurin. Her velja fleiri finskir næmingar eitt fremmandamál aftrat, serliga eru tað týskt og franskt, sum eru væl umtókt. Útbúgvingarstøðini aftaná Grundskúlan nevnast Miðalhøgar Útbúgvingar. Her er talan um tveir valmøguleikar: Studentaskúlar og Vinnuskúlar. Runt Finnland eru tað fleiri skúlar, sum fyrireika næmingarnar til tað altjóða studentaprógvið, IB. 60% av studentunum, sum verða klaktir, eru kvinnur.

**Sendingin »Finnland í 90 ár« verður á Rás 2 hósmorgunin**